Skuggar av tonkum

Yrkingar: »Skuggar av tonkum« eftir Haldur Suna.

»kanska skuldi eg
blakað plaggið
til bert tað nakna
holdið er eftir«.

Yrkingasavnið hjá Haldur Suna er merkt av stuttum og beinleiðis yrkingum. Hann yrkir einfalt og líkatil. Lívsviðurskiftini verða viðgjørd við orðum og myndum, sum eru leikandi og løtt, men samstundis eisini nakin og vill. Stílistiskt hava vit ikki nakra nýskapan sum so, men tað er einki kriterium fyri góðsku. Tað er mest nærliggjandi at skíra hetta modernistiskt ella – sum føroyingar nokk heldur vildi sagt – nýmótans føroysk yrking. Hetta hevur áður givið okkum menn sum Steinbjørn B. Jacobsen, Oddfríð M. Rasmussen og nú Haldur Suna. Eg ynski ikki at draga nakra beinleiðis linju millum hesar, men stílurin gevur leimum tað til felags, at yrkingarnar spríkja úr sjálvari kjarnini, og telgja sær ræsur inn í meiningina. Skuggar av tonkum hevur frálík dømi um hetta (fyri at nevna nøkur heiti); »Spinkla lív«, »Einki«, »Mær tørvar teg«, »Fjart í ringrás« og og vit kundu nevnt nógv fleiri.

Haldur Suni býtir savnið upp í tríggjar partar, ið ferðast úr gongdini gjøgnum kærleikan og inn í málið. Hesir tríggir partar eru ikki neyðvendigvís bundnir at hvørjum øðrum, men teir hava allir tað til felags, at teir, hvør sær eins væl og saman, standa sum grundarlag undir eini veru (einum eksistensi), og tískil gerst hetta ein felagsnevnari fyri øll. Vit kunnu øll síggja brot av kenslum hjá okkum sjálvum í hvørjum einstakum parti, og hetta ger savnið bæði nærverandi og viðkomandi.

Eg ætli mær ikki at fara undir at analysera yrkingarnar, tí at tað kann lesarin sjálvur gera við at ogna sær savnið, men eg ynski tó at nevna nøkur ting, sum traðka fram sum áhugaverdir træðrir gjøgnum savnið. Tað, sum nokk gongur týðiligast gjøgnum savnið, og kanska liggur sum ein grundhugsan undir yrkingunum, er lívsjáttanin. Hon sæst í øllum trimum pørtum, og bindur hesi ymisku evni saman í eina hugsan. Í fyrsta parti gongur hon saman við filosofiini, har vit hitta Sisyfos, Nirvana Askesa, Nietzsche og aðrar. Hóast vit ferðast ígjøgnum vavdar tankar og umfatandi spiritualistisk tíðarfenomen, so liggur eisini lívsjáttanin fremst her. Í hesum fyrsta parti er hon fyrst og fremst mest tengd at eydnuni, sum kanska kann skyldast filosofiska útgangsstøðinum:

»eydnan er bert løta
so skunda tær
og legg tær í geyma
alt annað er einki«
(úr Vinur mín)

Eisini stendur kærleikin sum grundarsteinurin undir bæði eydnuni og lívsjáttanini. Kærleikin til kvinnu, barn, foreldur, umhvørvið. Í hesum liggur eisini kærleikin til lívið sum ein forútsetningur:

»uttan kærleikan til
lívið
vil tómleiki verða
skurður tín á jørð«
(úr Vinur mín)


Í hesum øðrum parti skínur ein søtur longsul ígjøgnum, sum eitt slag av longsli eftir tí sum er, og sum yrkjarin longu er ein partur av og eigur lut í. Yrkingar sum eitt nú »Eg elski teg« og »Mia« eru dømi um henda djúpa kærleika, og vakra yrkingin »Degningsælið« er ein framúrskarandi náttúrumynd, sum á ein hátt er naturalistisk í sínum nakna andliti, men eisini rúmar aðrar djúpari liggjandi kenslur.

Seinasti parturin fer inn á málið. Bæði tað, sum vit hava (ella eiga), men eisini tað, sum vit ynskja men ikki altíð fáa so væl loyvi at hava. Sum eindømi um henda triðja part fari eg at anbefala fólki at lesa tað síðsta brotið, sum kanska heldur er prosa enn yrking, og sum eisini ber heitið á savninum, skuggar av tonkum;

»Orð hava einki at siga, bert tú skilir. Ofta haldi eg, at orð verða misskilt heldur enn skilt. Orð eru bara skuggar av tonkum, tí tú kanst sjáldan seta orð á júst tað tú hugsar, tað tú sært, hoyrir, smakkar, luktar, ella tað tú følir«.

Hetta seinasta brotið stendur sum eitt gott umboð fyri savnið, og tað sum tað kemur fram til og við. Eg havi ilt við at síggja nakra meining við at koma við eini pátikari pseudo- professionellari vurdering av hesum savni, men fari at heita á tey, sum hava hug, at lesa tað. Tað ber væl til og er ikki so torført.

Petur Jensen
Gøta



KROSSORÐAGÁTA

**Vinnari: Maiken Slættalíð,
460 Norðskála**

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: BASSARNIR

L	A	N	D	S	B	Ó	K	A	S	A	V	N	I	Ð	
E	L	D	U	V	I	K		S	P	R	E	K	I	Ð	
I	N	R	I		S	U	K	H	O	I		T			H
R	I		S		M	N		L	N		S		Ó	T	U
V	N		B	R	A	N	D	A	N	S	V	Í	K		N
I		A	U		R	U	I	N		A		F	U	N	D
K	I	R	R		I	M		D	A	N	N	Y		Æ	S
S	E	I	G	A		A	K		L	D		L	A	R	A
F		A		L	A	Ð	A	N	F	E	L	L	I		R
J	Ø	D	I		T	U	R	R	U	R		A	R	V	A
Ø	R	N	I	R		R	R		L	S	Ð			A	B
R	E	E			S		A	V	L	O	P	I	Ð		O
D			D	E	S	I	N		U	N		N		F	T
U	R	D	I	N		O	Ð	E	R		I	N	N	A	N
R	O		O	I	L		I	N		U	S	A		T	U
105	T	I	N	D	U	R		N	A	V	I	R	N	A	R

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: **106**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

**Frá
BÓKADEILD
FØROYA LÆRARAFELAGS:**

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

**Frá
FØROYA
SKÚLABÓKAGRUNNI:**

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

***Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.***